HAGTALSGRUNNURIN

# ROKNA PROSENT

HAGSTOVA FØROYA

# Endamál

Tað ber til at rokna tølini tú hevur funnið í Hagtalsgrunninum um til prosent.

> **DØMI**
> Vegleiðingin byggir á eitt dømi, har tú ynskir síggja fólkatalið í økjum umroknað til prosent

## Soleiðis gert tú

Vel hesa talvuna undir "Íbúgvar og val" og "Fólkatal"

IB01030 Fólkið skift á kyn, aldur og bygd 1. januar (1985-2019)

Her bólkar tú "bygd/býir" til økir og velur "øll økir" og árini "2017-2019". Tá kemur hendan talvan á skermin. Tú velur nú "Prosent" undir "Rætta og rokna"



Nýggjur valrútur kemur upp, har tú skalt velja, hvussu prosentið skal roknast, og hvat skal vísast

Tað eru 3 mátar at rokna, alt eftir hvat prosentið skal roknast av.

Í øllum trimum dømunum er “Vís bara prosent” valt.

## Máti 1

Ein máti er at rokna prosent út frá greining tilsamans.




Trýst á **Halt fram**, vel greiningina **bygd/býur** og trýst aftur **Halt fram**




Øll økini telja nú tilsamans 100%. Eitt sindur óheppið kanska við hesi talvuni, tí nú kemur “Alt landið” at vera 50%. Tað kundi tí í hesum døminum verið viðkomandi bert at valt økini, og ikki alt landið.

| | 2017 | 2018 | 2019 |
|---|---|---|---|
| **Alt landið** | 50,00 | 50,00 | 50,00 |
| **Norðoya øki** | 6,01 | 6,01 | 5,98 |
| **Eysturoyar øki** | 11,10 | 11,17 | 11,22 |
| **Norðstreymoyar øki** | 3,81 | 3,85 | 3,84 |
| **Suðurstreymoyar øki** | 20,00 | 19,94 | 20,05 |
| **Vága øki** | 3,17 | 3,20 | 3,20 |
| **Sandoyar øki** | 1,29 | 1,27 | 1,24 |
| **Suðuroyar øki** | 4,62 | 4,57 | 4,47 |

100%

## Máti 2

Ein annar máti er at rokna prosent út frá einstøkum greiningarvirði. Hetta er t.d. viðkomandi í fólktalvuni, um tú ynskir at síggju hvussu prosentbýtið er á ymsu økini ár fyri ár.




Trýsta á **Halt fram**, vel greiningina **bygd/býur** og trýst aftur **Halt fram**




Vel "Alt landið" at rokna prosentið av, og trýst á **Halt fram**




| | 2017 | 2018 | 2019 |
|---|---|---|---|
| **Alt landið** | 100,00 | 100,00 | 100,00 |
| **Norðoya øki** | 12,02 | 12,02 | 11,96 |
| **Eysturoyar øki** | 22,20 | 22,33 | 22,44 |
| **Norðstreymoyar øki** | 7,62 | 7,69 | 7,67 |
| **Suðurstreymoyar øki** | 40,00 | 39,88 | 40,09 |
| **Vága øki** | 6,33 | 6,41 | 6,41 |
| **Sandoyar øki** | 2,58 | 2,54 | 2,48 |
| **Suðuroyar øki** | 9,25 | 9,13 | 8,95 |

100%

## Máti 3

Triði máti kann rokna prosent út frá einstøkum dátupunti. Hetta kann t.d. vera viðkomandi í fólkatalvuni, um tú ynskir at síggja prosentbýtið til samlaða fólkatalið eitt ávíst ár.




Trýst á **Halt fram**, vel "Alt landið" og "2017" og trýst aftur **Halt fram**




| 100% | **2017** | **2018** | **2019** |
|---|---|---|---|
| **Alt landið** | 100,00 | 101,35 | 103,06 |
| **Norðoya øki** | 12,02 | 12,18 | 12,33 |
| **Eysturoyar øki** | 22,20 | 22,63 | 23,13 |
| **Norðstreymoyar øki** | 7,62 | 7,79 | 7,91 |
| **Suðurstreymoyar øki** | 40,00 | 40,41 | 41,32 |
| **Vága øki** | 6,33 | 6,49 | 6,60 |
| **Sandoyar øki** | 2,58 | 2,58 | 2,55 |
| **Suðuroyar øki** | 9,25 | 9,26 | 9,22 |